**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 15 |
| Tíð: | 08-12-2022 klokkan 13:00 – 14:30 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Petur Rouch, skrivari, Marin Rasmussen, limur og Robert Vilhelmsen, limur.

**Fundarskrá:**

1. Fyrireiking av skrá til fundin við borgarstjóran 12. desember.
2. Tiltøk í Tilhaldinum í 2023.
3. Senda skránna til Heilsu- og umsorganarfyrisitingina.
4. Senda boð til eykalimir um fundin mánadagin.

<u>AD 1 Fyrireiking av skrá til fundin við borgarstjóran 12. desember</u>

Á skránni til fundin við borgarstjóran mánadagin 12. desember:

1. Lyfta í Tilhaldinum - støðumeting.
2. Broytingar í viðtøkum fyri Eldraráðið (útreiðslur til val av Eldraráði).
3. Lutaíbúðir - hvørja støðu hevur TK til lutaíbúðir?
4. Framløga av tekningum til nýggja ellisheimið í Hoydølum.
5. Byggiviðtøkur fyri miðbýin (er nakað krav til arkitektur?).
6. Krav til byggiharrar um trygging av góðsku í bústaðarbygging.
7. Hvat er politikkurin hjá TK til bústaðarbygging og trivna hjá eldri borgarum í TK?

<u>AD 2 Tiltøk í Tilhaldinum í 2023</u>

Á fyrsta fundi í 2023 er ætlanin at bjóða Eirik Suna Danielsen at leggja til rættis tiltøk í Tilhaldinum um ymisk mál, sum eru viðkomandi fyri eldra borgaran.Talan kann til dømis vera um:

- Arvarætt.
- Tá makin fellur frá.
- Talgildi samleikin (brúk av Vanganum).

<u>AD 3 Senda skránna til Heilsu- og umsorganarfyrisitingina</u>

Skráin verður send seinni í dag.

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

<u>AD 4 Senda boð til eykalimir um fundin mánadagin</u>

TK sendir øllum luttakarum teldupost um fundin.

Komandi fundur í Eldraráðnum verður 12. januar 2023 klokkan 13 í Tilhaldinum.

Fundur lokin klokkan 14:30.

Tórshavn 08-12-2022

Petur Rouch,
skrivari